Tilbúgvingarætlan fyri farsóttir

Heilsustýrið

Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit 2

Inngangur 4

Arbeiðssetningur 6

Heimsfarsóttir 8
- Pest 9
- Virus 10
- Influensuvirus 10
- Djórastovnar 11

Lógargrundarlag 12

Bygnaður og fyriskipanir 14
- Heilsutilbúgving 15
- Politiski myndugleikin 17
- Kreppuráðið fyri Føroyar 17
- Heilsumálaráðið 17
- Farsóttarnevndin 17
- Heilsustýrið 18
- Sjúkrahúsverkið 19
- Heilsutrygd 20
- Átaksráðið 20
- Kommunufelagið 20
- Apoteksverkið 20
- Heilsufrøðiliga Starvsstovan/Landsdjóralæknin 21

Operativa toymið 22

Tilbúgvingarætlanirnar hjá ymisku myndugleikunum 24
- Heilsustýrið 25
- Farsóttarnevndin 26
- Sjúkrahúsverkið 27
- Apoteksverkið 27
- Landsdjóralæknin/Heilsufrøðiliga Starvsstovan 29

Keldur 31

Fylgiskjøl 31

Heilsustýrið

Eirargarður 2, 2. hædd
100 Tórshavn

(+298) 30 90 60
hst@hst.fo
www.hst.fo

Snið: Sansir

Inngangur

Tíðin gongur, og korona er næstan burtur úr okkara hugaheimi. Tvey ár við frástøðu, sóttarhaldi og stúran eru farin, og gerandisdagurin komin aftur í aftur, tó við øðrum álvarsligum viðurskiftum í heiminum, so sum kríggi í Ukraina og miðeystri og veðurlagsbroytingum.

Vandin fyri størri farsóttum í Føroyum er sum heild lítil. Føroyar hava eitt vælvirkandi heilsuverk og sum heild er heilsustøðan hjá fólki góð. Farsóttin við COVID-19 vísti, at vit í Føroyum kortini kunnu verða rakt, serliga av nýggjum sjúkum, sum vit ikki hava mótstøðuføri fyri og avmarkaða vitan um. Tílíkar farsóttir kunnu hava avleiðingar fyri fólkaheilsuna og samfelagið. Átøkini í sambandi við COVID-19 heimsfarsóttina vístu, hvat kann røkkast við politiskari og samfelagsligari undirtøku og fígging til tiltøkini. Kjarnin í tilbúgvingarætlanini fyri farsóttir er at tryggja arbeiðsorku og fígging til í felag at verða til reiðar til næstu heimsfarsótt.

Eftirmetingar eru gjørdar fyri COVID-19 farsóttina, bæði í altjóða høpi og her á landi. Hetta hevur havt við sær, at WHO og ES hava mælt til at dagføra tilbúgvingina og serliga heilsutilbúgvingina í øllum londum kring heimin. Við støði í hesum eggjar WHO til at:

1. dagføra tilbúgvingarætlanir, sum vísa raðfestar tilgongdir, og sum taka atlit til royndir frá farnum hendingum.
2. bøta sambandið millum partarnar, sum leggja til rættis heimsfarsóttartilbúgvingina, við skipaðari samskipan og samstarvi. Hetta fevnir um at byggja upp rættvísar skipanir, at fremja felags venjingar og at deila kunning um góðar mannagongdir, avbjóðingar og møguleikar.
3. seta av áhaldandi íløgur, fígging og eftirlit av heimsfarsóttartilbúgving við serligum denti á at loysa teir manglar, sum eru staðfestir áður í sambandi við heimsfarsóttir og farsóttir.

Arbeiðssetningur

Landsstýriskvinnan í heilsumálum setti í mai 2023 ein arbeiðsbólk at orða eina tilbúgvingarætlan fyri farsóttir fyri Føroyar.

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum er:

- at gera eina tilbúgvingarætlan fyri, hvussu tilfeingið í føroyska heilsuverkinum og samfelagnum sum heild skal skipast í sambandi við eina heimsfarsótt.
- at lýsa, hvussu Føroyar frameftir tryggja sær atgongd til koppingarevni og verndarútgerð í sambandi við eina komandi heimsfarsótt.
- at arbeiðið við tilbúgvingarætlanini verður gjørt við støði í tilbúgvingarætlanum í okkara grannalondum umframt tilmælum frá WHO, men at hesi verða lagað til føroysk viðurskifti.
- at tað í arbeiðsgongdini við tilbúgvingarætlanini verður tikið atlit til niðurstøðurnar í eftirmetingini „Hvussu stýrdu Føroyar gjøgnum Covid-19 kreppuna?“ hjá Løgmansskrivstovuni.

Arbeiðsbólkurin er mannaður við hesum umboðum:

- **Bjarni á Steig**, stjóri í Heilsustýrinum og formaður
- **Lars Fodgaard Møller**, landslækni
- **Pál Weihe**, yvirlækni og professari í fólkaheilsu í Sjúkrahúsverkinum
- **Súsanna Olsen**, varastjóri í Sjúkrahúsverki Føroya við sjúkraøktarfakligari bakgrund
- **Shahin Gaini**, yvirlækni og professari í infektiónsmedisini í Sjúkrahúsverkinum
- **Elin Jensen**, yvirlækni/liðlækni á Bráðdeplinum á Landssjúkrahúsinum
- **Lena Lambaa**, smittuverjufrøðingur í Sjúkrahúsverkinum
- **Leivur Persson**, stjóri í Arbeiðs- og brunaeftirlitinum
- **Birna Mørkøre**, landsdjóralækni
- **Hjalti Gunnarstein**, landsapotekari
- **Gunnhild Helmsdal**, kommunulækni
- **Birita Ludvíksdóttir**, løgfrøðingur, ráðgevi í Heilsumálaráðnum
- **Eyðun Christiansen**, stjóri í Kommunufelagnum
- **Michael Boolsen**, Fúti
- **Naina á Túgvusteini**, Kommunufelagið

Arbeiðsbólkurin kann eisini kalla onnur umboð inn á fund eftir tørvi.

Arbeiðsbólkurin hevur uppgávuna at skriva ætlanina. Hetta merkir, at bólkurin skal fáa tilfar til vega og umrøða tey ymisku viðurskiftini, ið skulu lýsast í ætlanini.

Heimsfarsóttir

Søguliga er pest hin kendasta heimsfarsóttin og kann staðfestast 5000 ár aftur í tíðina. Skjalfestar eru tríggjar heimsfarsóttir og fleiri smærri farsóttir við pest. Hin fyrsta er frá ár 500, og mett verður, at 40 milliónir fólk doyðu. Onnur heimsfarsóttin er frá 1340-árunum, tá ein triðingur av øllum fólkum í Evropa doyðu, og hin triðja er frá 1850-árunum, tá 12 milliónir fólk lótu lív.

Pest

Pest stendst av bakteriuni, Yersina pestis, og er ein sokallað zoonosa. Tað merkir, at djór eru vertir hjá bakteriuni, sum býr í eini loppu á djórunum. Rotta er kendasta vertsdjórið, men onnur gnagdjór kunnu eisini vera vertir. Smittan kemur av, at loppan bítur fólk, og so kemur bakterian inn undir húðina, har hon margfaldast og elvir til svullapest. Oman fyri 80 % av smittutilburðunum fara fram á henda hátt. Deyðstalið fyri svullapest er umleið 50 %, um eingin viðgerð verður givin.

Enn álvarsligari er lungnapest, sum er tað, vit rópa svartideyði. Svartideyði stendst av, at lunguni tippast av bakterium og immunverjuni, og fólk gerast kølblá, harav heitið svartideyði. Deyðstalið er 100 %, um eingin viðgerð verður givin. Fólk við lungnapest smitta við luftbornari dropasmittu, við at dropar við bakterium fara inn í andaleiðina og til lunguni. Smitta kann eisini koma av, at dropar úr opnum svullum verða andaðir inn og ferðast til lunguni við blóðinum, sum harvið verður atvoldin til svartadeyða.

Fram til 1800-talið var vitanin um smittu lítil, men tó var greitt, at smittan fór frá fólki til fólk. Sóttarhald (karantena) var brúkt sum ein hin mest týðandi fyribyrgingarhátturin. Orðið karantena kemur úr latínska, quarantena, sum merkir 40 og frágreiðingin til, at hetta orðið varð brúkt, er, at fólk, , sum vórðu hildin at vera smittað, vórðu avbyrgd í 40 dagar. Seinni er ávíst, at uml. 37 dagar ganga, frá tí tú ert smittað/ur, til tú doyrt av pest. Tá ið Alexander Yersin og Kitasato Shibasaburō í 1894 funnu bakteriuna, yersinia pestis, á rottu og á smittaðum fólki, bar til at fyribyrgja pest. Bøtt reinføri og kloakkskipan vóru fyrstu stigini, sum vórðu tikin. Seinni er antibiotika, sum lekir sjúkuna, komið. Enn eru tó smærri smittuútbrot m.a. í India, men pest verður ikki mett sum ein hóttan fyri heimin í dag.

Virus

Virus, serliga influensuvirus og síðst SARS-CoV-2, hava hótt heilsuna hjá menniskjum og djórum í øldir. Ymiskleikin og tendensurin hjá virusum til at mutera hava darvað strembanini eftir at menna bæði eina algilda koppseting og munadyggan heilivág ímóti virusi. Ein heimsfarsótt stendst, tá eitt virus megnar at smitta illa og ferðast skjótt millum menniskju.

Heimsfarsóttir standast av ymsum virusinfektiónum, og influensuvirus hevur verið mest ráðandi. Ein vanlig farsótt við influensu verður mett at elva umleið 2000 fólkum deyðamein í Danmark um árið, og eini 90% av deyðstilburðunum eru hjá fólki yvir 65 ár. Í Føroyum verður talið mett at liggja millum 5 og 20 um árið.

Í 1900-talinum vóru í minsta lagi tríggjar heimsfarsóttir: Spanska sjúkan í 1918-19, asiatiskt beinkrím í 1957-58 og Hong Kong-beinkrím í 1968-69. Afturat hesum var ein ivasom heimsumfarssótt í 1977. Av hesum var spanska sjúkan hin álvarsamasta. Mett verður, at spanska sjúkan, ið mest var millum ung og yngri vaksin, elvdi til, at 50 milliónir fólk doyðu. Í Føroyum doyðu sambært skjølum 13 fólk av sponsku sjúkuni.

Influensuvirus

Influensuvirus A og B, ið eru týdningarmestu sløgini, hava sama bygnað. Innan í hesum virusum er ílegutilfarið, ið er býtt í átta petti hvør sær. Virusbitlarnir eru fevndir av eini uttari kápu, og í henni eru tveir týdningarmiklir proteinpartar, ið nevnast hæmagglutinin (H) og neuraminidasa (N). Hesir partar hava avgerandi týdning fyri, hvussu virus loypir á kyknurnar hjá fólki, og hvussu virus breiðir seg í likaminum. Hæmagglutinin er virkið at binda virus til kyknurnar, meðan neuraminidasa virkar við at loysa virus frá smittaðum kyknum. Serliga flogfenaður, og av hesum serstakliga antarfuglar, er vertur fyri influensu A, meðan influensa B bert er at finna hjá fólki. Eru broytingarnar av virusi meira víðfevndar, kann tað elva til serligar, álvarsamar heimsfarssóttir. Influensa kann í ávísan mun fyribyrgjast ella viðgerast við koppseting ella við heilivági.

Djórastovnar

Um allan heim er neyv yvirvøka av sjúkum í djórastovnum. Hetta tí at fleiri sjúkur eru zoonotiskar, sum merkir at smitta ferð frá djór til menniskja. Tí kann tað henda, at sjúkur, sum annars bara hava verði á djórum, mutera og smitta mennikjan.

Í løtuni verður óttast fyri, at ein nýggj heimsfarsótt fer at standast av H5N1-influensu millum fuglar. Influensan tók seg upp í 1997 og hevur breitt seg til fuglar í Asia, Evropa og Afrika. Virusið hevur víst seg at kunna smitta fleiri (djóra)sløg, undir hesum flytifuglar, grísar, kettur og menniskju.

Ógjørligt er at meta, um H5N1 fer at elva til eina heimsfarsótt. Søgan vísir, at um tað ikki hendir, fer eitt nýtt influensuvirus at vísa seg onkuntíð í framtíðini og verða ein hóttan móti heimsins íbúgvum, sum eru óvardir.

Sambært altjóða djóraheilsustovninum, WOAH, stava tríggir fjórðingar av nýkomnum smittandi sjúkum frá djórum. Hetta er ein av orsøkunum til, at nógv verður gjørt burturúr at niðurberja farsóttir hjá djórum. Fuglakrím er ein av djórasjúkunum, sum hevur gjørt nógv um seg hjá flogfenaði og villum fugli, og varð eisini staðfest í Føroyum á heysti í 2021. Mest vanliga slagið hevur verið H5N1, men eisini aðrir variantar eru, m.a. H5N5, sum nýliga er staðfest í Føroyum og ymsa aðrastaðni í Norðurevropa, fyrst og fremst hjá villum fugli.

Umráðandi er áhaldandi at vera á varðhaldi fyri at byrgja fyri, at fuglakrím gerst ein nýggj heimsfarsótt. Tað, at fuglakrím smittar súgdjór, sum lívfrøðiliga eru meira lík fólki enn fuglar, vísir, at tað er ikki ósannlíkt, at virusið kann tillaga seg til at smitta fólk. Harafturat kunnu fuglakrímsvirus saman við øðrum virusum hjá súgdjórum, gerast eitt nýtt slag av influensuvirusi hjá fólki.

Lógargrundarlag

Sambært § 1 í tilbúgvingarlógini er endamálið við tilbúgvingini at fyribyrgja, avmarka og bøta um skaða á fólk, djór, umhvørvi, virði og ognir í sambandi við skaðahendingar ella vanlukkur, ella tá hóttandi vandi er fyri hesum, og at tryggja, at virkisførið í samfelagnum minst møguligt verður skert ella fer til grundar, orsakað av skaðahendingum ella vanlukkum. Sambært § 2 skal hvørt landsstýrisfólk, fyri sítt ábyrgdarøki, hava eina tilbúgving samsvarandi ásetingunum í § 1. Sambært § 8 í tilbúgvingarlógini skulu kommunurnar eisini hava eina tilbúgvingarætlan, sum kann vera felags fyri fleiri kommunur.

Hesar lógir eru grundarlag fyri hesi tilbúgvingarætlan.

- Anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven, sum broytt við anordning nr. 1443 frá 29. juni 2021 (sundhedsloven)
- Anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 41 frá 29. mars 2023 (epidemiloven)
- Løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2020 (apotekslógin)
- Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 (tilbúgvingarlógin)
- Løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2022 um Heilsustýrið
- Løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022 (djórasjúkulógin)
- WHO: International Health Regulations

Bygnaður og fyriskipanir

Føroyar hava eitt vælvirkandi sjúkrahúsverk, sum viðger sjúk og skadd. Umráðandi er, at allir partar av heilsuverkinum eisini eru til reiðar, skuldi tørvur verið á bráðfeingis átøkum orsakað av eini heimsfarsótt.

Rakstraruppgávurnar í sjúkrahúsverkinum liggja hjá Heilsumálaráðnum. Tætt samstarv er við kommunurnar, sum í sambandi við eina heimsfarsótt eisini skulu tryggja, at heilsuverkið kann víðka og umleggja sín viðgerðar- og røktarkapasitet út um gerandisstigið.

Henda tilbúgvingarætlanin setir upp yvirskipaðar karmar fyri tilrættislegging av heilsutilbúgvingini hjá øllum avvarðandi pørtum.

Heilsutilbúgving
Heilsustýrið er fyrisitingarligi myndugleikin innan heilsutilbúgving í Føroyum og umsitur heilsutilbúgving og farsóttir. Heilsustýrið samskipar heilsutilbúgvingina við avvarðandi partar í heilsuverkinum, sum fevna um:

Sjúkrahústilbúgving
Sjúkrahústilbúgvingin er tilbúgvingin í samlaða sjúkrahúsverkinum. Sjúkrahústilbúgvingin skal tryggja, at sjúkuviðgerð kann verða veitt á sjúkrahúsi.

Heilivágstilbúgving
Apoteksverkið hevur ábyrgd av heilivágstilbúgvingini, sum er tilbúgvingin fyri heilivág og medisinska útgerð. Heilivágstilbúgvingin skal tryggja, at til ber at eftirlíka broyttum krøvum viðvíkjandi nýtslu, veiting og útbreiðslu, sum skulu væntast í sambandi við tilbúgvingarátøk.

Primeri heilsugeirin
Tilbúgvingin í primera heilsugeiranum er tilbúgvingin í tí partinum av heilsuverkinum, sum ikki er partur av sjúkrahústilbúgvingini ella uttanhýsis sjúkrahústilbúgvingini, t.d. kommunulæknar, heimarøkt, Almannaverkið og apoteksverk. Primeri heilsugeirin skal tryggja framhald av uppgávunum umframt at laga seg til broyttu krøvini, sum støðan elvir til, undir hesum fyribyrgingar-, viðgerðar- og umsorganaruppgávur.

Partarnir í farsóttartilbúgvingini



Partarnir í farsóttartilbúgvingini:

- Politiski myndugleikin
- Kreppuráðið fyri Føroya
- Heilsumálaráðið
- Farsóttarnevndin
- Átaksráðið
- Heilsustýrið
- Sjúkrahúsverkið
- Heilsutrygd
- Kommunufelagið
- Apoteksverkið
- Landsdjóralæknin/Heilsufrøðiliga Starvsstovan
- Operativa toymið (OT)
- Løgreglan
- Almannaverkið

Politiski myndugleikin

Í yvirtiknum málum er lóggávuvaldið hjá løgtinginum og løgmanni í felag. Útinnandi valdið er hjá landsstýrinum Løgmaður býtir málsøki landsstýrisins millum landsstýrisfólkini. Tey sita fyri málsøkjum sínum hvør sær[1]. Í løtuni hevur landsstýrisfólkið í heilsumálum evstu ábyrgd av farsóttarmálum og heilsutilbúgving. Tá ið ein farsótt herjar, ið fevnir um fleiri geirar, skal hvørt landsstýrisfólk sær hava eina tilbúgving fyri sítt ábyrgdarøki. Løgmaður samskipar virksemið hjá landsstýrisfólkunum og tryggjar, at landsstýrisfólkini umsita sítt málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.[2]

Kreppuráðið fyri Føroyar

Útgangsstøðið fyri føroysku tilbúgvingina er, at kreppur og tilbúgvingarstøður skulu handfarast av viðkomandi økisábyrgdarmyndugleikum og stovnum – t.d. skulu farsóttir og aðrar heilsukreppur í fyrsta umfari handfarast og samskipast í heilsugeiranum (t.d. Heilsumálaráðnum, Heilsustýrinum, og Sjúkrahúsverkinum). Fara hesar kreppur og tilbúgvingarstøður at fevna um fleiri geirar, er neyðugt at seta í verk yvirskipaðu føroysku kreppustýringina, soleiðis sum henda er lýst í yvirskipaðu kreppustýring fyri Føroyar. Henda ætlanin fevnir bæði um eitt politiskt stig (Føroya Landsstýri), eitt strategiskt stig (Kreppuráðið fyri Føroyar) og eitt rakstrarligt stig (Átaksráðið fyri Føroyar).

Endamálið við at kalla Kreppuráðið fyri Føroyar saman er at tryggja, at umboðini í ráðnum hava eitt stað, har økisábyrgdarpartarnir hittast og taka sær av yvirskipaðu, tvørfakligu samskipanini í sambandi við størri tilburðir í Føroyum.

Í sambandi við farsóttir eigur Kreppuráðið at verða kallað saman. Hetta verður gjørt við, at aðalstjórin í Heilsumálaráðnum heitir á samskipanina hjá Kreppuráðnum (Arbeiðs- og brunaeftirlitið) um at kalla ráðið saman. Kreppuráðið tekur síðani støðu til, hvat tilbúgvingarstig verður ásett fyri ráðið, og í hvønn mun tvørgangandi samskipanin skal setast í verk.

Í Kreppuráðnum eru aðalstjórar umboðandi øll aðalráð, stjórin í Kommunufelagnum, fútin, Heilsustýrið og Arktisk kommando. Eisini kunna aðrir aktørar verða innkallaðir ad hoc. Kreppuráðið hevur avgerandi týdning fyri at fáa eina samskipaða kreppustýring tvørtur um geirar, hóast ráðið ikki hevur nakran sjálvstøðugan avgerðarmyndugleika.

Heilsumálaráðið

Heilsumálaráðið er umsitingin hjá landsstýrisfólkinum í heilsumálum, sum er ovasti myndugleiki á heilsuøkinum. Heilsumálaráðið ráðgevur landsstýrisfólkinum og fyrireikar lógaruppskot á heilsuøkinum, ið landsstýrisfólkið leggur fyri Føroya Løgting. Ráðið hevur uppgávuna at fyrisita, at heilsulóggávan verður framd á teimum stovnum, sum eru skipaðir undir Ráðnum. Í farsóttarhøpi hevur Heilsumálaráðið uppgávuna at tryggja sær, at heilsuverkið og Heilsustýrið fremja tær uppgávur, sum farsóttartilbúgvingarætlanin ásetir. Harumframt er tað uppgávan hjá Heilsumálaráðnum at leggja uppskot fyri Løgtingið um at fáa játtan til tey serligu átøk, sum Farsóttarnevndin og Heilsustýrið meta eru neyðug.

Farsóttarnevndin

Uppgávan hjá Farsóttarnevndini er at verja Føroyar móti, at smittusjúkur breiða seg í landinum og at fyribyrgja, at hesar sjúkur koma til landið og fara úr landinum. Til hetta hevur Farsóttarnevndin ymiskar atgerðarmøguleikar, sum eru ásettir í lóg, so sum tvungið sóttarhald og tvungna læknakanning, áðrenn fólk sleppa inn í landið eins og tvungin koppseting.

Lógargrundarlagið er:

- Anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 41 frá 29. mars 2023 (epidemiloven). Henda lógin er galdandi frá 1. jan. 2024, tá ið farsóttarmálsøkið var yvirtikið.
- Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme,

1 Smbr. § 33, stk. 1 í stýrisskipanarlógini
2 Smbr. § 33, stk. 2 og 3 í stýrisskipanarlógini

sum seinast broytt við bekendtgørelse nr. 180 frá 5. mars 2020 og frá 1. januar 2024 eisini.
- Løgtingslóg um broyting í anordning for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme.

Farsóttarnevndin er frá 1. januar 2024 mannað við: fútanum, stjóranum fyri Heilsustýrið, Landslæknanum, landsdjóralækanum, stjóranum fyri TAKS, stjóranum fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og harafturat við trimum limum, sum landsstýriskvinnan í heilsumálum velur. Í løtuni eru tað aðalstjórin í Heilsumálaráðnum, ein kliniskur varastjóri í Sjúkrahúsverkinum og stjórin í Kommunufelagnum. Farsóttarnevndin velur sjálv, hvør skal vera forfólk í nevndini. Heilsustýrið skal vegleiða Farsóttarnevndini í tann mun, tørvur er á tí.

Heilsustýrið

Heilsustýrið umsitur tilbúgvingina í heilsuverkinum og farsóttarlógina.

Tilbúgvingin hjá Heilsustýrinum verður sett í verk ,eitt nú tá ávísar smittusjúkur taka seg upp. Heilsustýrið fylgir gongdini við smittustøðuni í Føroyum, í grannalondunum eins og á heimsstigi fyri at kunna gera eina váðamynd fyri álvarsliga smittusjúku og gera eina meting av, nær neyðugt er at seta farsóttartilbúgvingina í verk. Heilsustýrið mennir vegleiðingar og leiðreglur, sum lýsa leiklutirnar hjá heilsumyndugleikum og øðrum myndugleikum, um Føroyar verða raktar av eini farsótt e.l. Hesar verða lagdar á heimasíðun hjá Heilsustýrinum.

Tilbúgvingin hjá Heilsustýrinum verður eisini sett í verk, um Føroyar verða raktar av vanlukku ella álopi, sum hava við sær, at nógv særd skulu hava bráðfeingis viðgerð á einum átaksøki og á sjúkrahúsi. Heilsustýrið samstarvar í tílíkum føri við Sjúkrahúsverkið, Apoteksverkið og Heilsutrygd um at tryggja, at heilsuverkið kann tillaga kapasitetin, so neyðugt pláss, starvsfólk, heilivágur og útgerð eru tøk at nøkta tørvin á viðgerð.

Alt eftir hvørja hending talan er um, og hvussu umfatandi hon er, hevur Heilsustýrið hesar uppgávur:
- Heilsustýrið greiðir úr hondum yvirskipaðar leiðreglur fyri, hvussu hendingin skal handfarast
- Heilsustýrið heldur samband við kommunalu heilsutilbúgvingina og aðrar heilsumyndugleikar fyri at fáa yvirlit og samskipa fyri alt landið.
- Heilsustýrið rágevur kommunum og Almannaverkið um tilbúgvingarátøk.
- Heilsustýrið kunnar alment um heilsuligu avleiðingarnar og fyrivarni av hendingini.
- Heilsustýrið samskipar við og kunnar myndugleikar í øðrum londum.

- Tá ógvuliga umfatandi ella markbrótandi hendingar fara fram, skal Heilsustýrið halda sambandið við onnur lond fyri at samskipa átøkini.

Sjúkrahúsverkið

Sjúkrahúsverkið hevur, saman við kommunulæknunum, fakligu førleikarnar at staðfesta sjúkutilburðir hjá tí einstaka, at viðgera teir og at gera av, í hvønn mun ein sjúklingur skal avbyrgjast. Sjúkrahúsverkið hevur serlæknaførleikar innan infektiónsmedisin og servitan innan smittandi sjúkur. Sjúkrahúsverkið hevur seingjarpláss á teimum trimum sjúkrahúsunum (Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús), har smittað kunnu verða avbyrgd. Tá talan er um sera vandamiklar smittandi sjúkur, er talið av seingjum, sum kunnu avbyrgjast munagott, tó sera avmarkað. Sjúkrahúsverkið verður stýrt av eini stjórn, og undir henni eru Klaksvíkar Sjúkrahús, Suðuroyar Sjúkrahús og Landssjúkrahúsi við fakligu deplunum, millum teirra Medisinski depilin, sum hevur um hendi smittaðar sjúklingar.

Landssjúkrahúsið hevur eina tilbúgvingarætlan (sí fylgiskjal), sum nágreiniliga áseta, hvussu farast skal fram í ymiskum støðum, har vandi er fyri stórskaða, teirra millum álvarsligar farsóttir.

Heilsutrygd

Heilsutrygd skipar primera heilsugeiran, sum kommunulæknaskipanin er partur av. Kommunulæknarnir hava í farsóttartíðum ein avgerandi leiklut í sóttartálmingini, tí teir eru vanliga fyrstir at staðfesta smittusjúku úti í samfelagnum. Kommunulæknar kunnu eisini hava ein leiklut í sambandi við møguliga hópkoppseting.

Átaksráðið

Yvirskipaða kreppustýringin í Føroyum

Útgangsstøðið fyri føroysku tilbúgvingina er, at kreppur og tilbúgvingarstøður skulu handfarast av viðkomandi økisábyrgdarmyndugleikum og stovnum – t.d. skulu farsóttir og aðrar heilsukreppur í fyrsta umfari handfarast og samskipast í heilsugeiranum (t.d. Heilsumálaráðnum, Heilsustýrinum og Sjúkrahúsverkinum). Fara hesar kreppur og tilbúgvingarstøður at fevna um fleiri geirar, er neyðugt at seta í verk yvirskipaðu føroysku kreppustýringina, soleiðis sum henda er lýst í yvirskipaðu tilbúgvingarætlanini fyri Føroyar. Yvirskipaða kreppustýringin í Føroyum kann setast í verk við at heita á Arbeiðs- og brunaeftirlitið um at seta skipanina í verk.

Leiðslubygnaðurin í yvirskipaðu kreppustýringini hevur trý viðkomandi stig:

Stig 1: Føroya Landsstýri (politiskt stig): Í samband við størri hendingar verður Føroya Landsstýri kunnað av Kreppuráðnum fyri Føroyar, og tosað verður um viðurskifti, ið hava strategisk ella politisk eyðkenni.

Stig 2: Kreppuráðið fyri Føroyar (strategiskt stig): Kreppuráðið fyri Føroyar hevur yvirskipaðu tvørgangandi kreppustýringina, ið er lýst í Yvirskipaðu tilbúgvingarætlanini fyri Føroyar. Kreppuráðið, sum er sett saman av aðalstjórunum, fútanum, leiðsluni fyri Arktisk Kommando í Føroyum og leiðsluni í Kommunufelagnum, ráðgevur Føroya Landsstýri í kreppustøðum og er staðið fyri strategiskum orðaskifti millum land og kommunur og millum føroyskar og danskar myndugleikar. Kreppuráðið hevur ikki sjálvstøðugan avgerðarmyndugleika, men er mannað við fólki, ið kunnu geva tænastuboð til flestu økisábyrgdarmyndugleikarnar. Endamálið við at kalla Kreppuráðið fyri Føroyar saman er at tryggja, at umboðini í ráðnum hava eitt stað, har tað ber til at umrøða og fáa eina greiða støðumynd av yvirskipaðu kreppustøðuni. Endamálið er eisini at taka støðu til fyrispurningar, tilmæli og umbønir frá Átaksráðnum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið virkar sum samskipandi stápseind og skrivstova hjá Kreppuráðnum. Myndugleikin er eisini bindilið millum Kreppuráðið og Átaksráðið.

Stig 3: Átaksráðið fyri Føroyar (rakstrarligt stig): Átaksráðið fyri Føroyar skal styrkja samskipanina millum viðkomandi føroysku økisábyrgdarmyndugleikarnar í samband við størri hendingar og vanlukkur. Átaksráðið fyri Føroyar skal somuleiðis lata eina dagførda støðumynd til Kreppuráðið fyri Føroyar, so umboðini í Kreppuráðnum kunnu taka avgerðir út frá einum sakligum og fakligum grundarlagi. Umframt tað hevur Átaksráðið fyri Føroyar uppgávuna at samskipa nýtsluna av samlaða tilfeinginum, tað verði seg útgerð, fólk og førleikar. Endamálið er at fáa best nyttu av samlaða tilfeinginum í Føroyum. Fasta umboðan í Átaksráðnum fyri Føroyar hava MRCC Tórshavn, Føroya Politi, Arbeiðs- og brunaeftirlitið, umboð fyri kommunalu tilbúgvingina, Heilsustýrið, Umhvørvisstovan, Landsdjóralæknin og umboð fyri Arktisk Kommando. Aðrir myndugleikar og stovnar kunnu kallast inn eftir tørvi.

Kommunufelagið

Kommunurnar í Føroyum hava ábyrgdina av heilsutænastum til ellis- og røktarheim, heimatænastuni til tey gomlu, dagstovnum og partvís fólkaskúlunum, har kommunurnar hava ábyrgd av bygningum og húsavørðum. Í sambandi við farsóttartilbúgvingina er sera umráðandi, at tað er heilt greitt, at tað er tilbúgvingarbólkurin hjá kommununum, sum hevur yvirskipaðu heilsufakligu ábyrgdina av kommunalu heilsutænastuni.

Apoteksverkið

Í Føroyum hevur Apoteksverkið einkarætt til at framleiða, innflyta, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, íroknað koppingarevni og ávísur medisinskur útbúnaður. Meginparturin av heilivágnum til humana økið kemur frá veitarum í Danmark. Í farsóttartilbúgvingarhøpi er tað av avgerandi týdningi, at Apoteksverkið tryggjar sær veitingar av koppingarevnum og øðrum heilivági soleiðis, at vit kunnu rokna við at fáa henda heilivág samstundis sum Danmark og onnur lond í ES.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan/ Landsdjóralæknin

Endamálið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni er at gera lógarásett eftirlit og starvstovukanningar innan matvøru-, veteriner- og umhvørvisøkið og at granska og menna í tilknýti til hesar lógarásettu uppgávur.

Um ein heimsfarsótt kemur, sum umframt at smitta millum menniskju eisini smittar millum djór og menniskju, er umráðandi at seta tiltøk í verk fyri at fyribyrgja smittu við innfluttum djórum og frá teimum djórum, sum longu eru í Føroyum – um neyðugt eisini viðvíkjandi flytifugli. Djórasjúkulógin áleggur fráboðanarskyldu fyri ávísar djórasjúkur, undir hesum zoonosur, og gevur heimild til at gera kanningar, avbyrgja og um neyðugt avlíva djór fyri at berja niður smittu.

Landsdjóralæknin hevur ábyrgdina av, at neyðug átøk viðvíkjandi djórum, sum kunnu vera ein hóttan móti fólkaheilsuni, verða framd. Landsdjóralæknin og Heilsustýrið eiga javnan at kunna hvørt annað um sína støðumeting. Molekylærbiologiska kanningarstovan á Heilsufrøðisligu starvsstovu hevur førleika til og ábyrgdina av at seta egnaðan kanningarhátt í verk og skjótt vera klár til hópkanningar í sambandi við eini farsótt.

Operativa toymið

Eitt operativt toymi (OT) verður skipað til farsóttarátøk.

Limirnir í bólkinum skulu vera:

- Stjórin í Sjúkrahúsverkinum, stjórin í Heilsutrygd og stjórin í Kommunufelagnum.
- OT er ein samskipandi eind í farsóttarmálum fyri Sjúkrahúsverkið, primera geiran og kommunurnar. OT er skipað undir Heilsustýrinum.
- OT skal støðugt kunna Heilsustýrið um sínar metingar, áðrenn átøk verða sett í verk. Hetta til at tryggja, at átøkini eru í samsvari við Farsóttarnevndina, Heilsumálaráðið, og við WHO. Tá ið átøk verða sett í verk, verður samanborið við átøk í Danmark og øðrum grannalondum.
- Heilsustýrið innkallar OT til fundar, tá ið tørvur er á tí. OT kann harumframt bjóða øllum fakfólki, sum tey meta vera neyðug, við á fund.

OT ráðgevur Heilsustýrinum um neyðug átøk um tillagingar av dagliga rakstrinum t.d. at fáa til vega seingjarpláss, avbyrgingarstovur, útskrivingar av sjúklingum áðrenn tíð og at skipa fyri og fremja hópkoppseting (sí fylgiskjal). Harumframt skal OT tryggja innkeyp í góðari tíð av nýtsluvørum, so sum maskum og kemiskum reagensum til diagnostikk. Her hevur Sjúkrahúsverkið ein høvuðsleiklut.

Mælt verður til, at eitt umboð fyri Kommunufelagið fær sæti í OT, soleiðis at kommunurnar kunnu tryggja sær, at neyðug átøk verða framd innan eldraøkið, barnaansingarøkið og Almannaverkið.

Heilsutrygd, sum hevur sektorábyrgd fyri primæru heilsutænustuna, fær sæti í OT til tess at tryggja síni áhugamál og sjónarmið í bráðfeingis heilsuátøkum fyri alt samfelagið. Kommunulæknar eiga oftast at luttaka á hesum fundum, soleiðis at teirra serkunnleiki innan primera geiran verður tikin við, tá ið avgerðir verða tiknar.

Operativa toymið (OT)



Tilbúgvingarætlanirnar hjá ymisku myndugleikunum

Heilsustýrið
Leikluturin hjá Heilsustýrinum í sambandi við farsóttartilbúgving fevnir ógvuliga breitt, og uppgávurnar eru alt frá ráðgeving og samskipan til meira praktiskar uppgávur.

Yvirvøka
- Heilsustýrið fylgir smittustøðuni fyri álvarsligar smittusjúkur bæði í Føroyum og í altjóða høpi.
- Heilsustýrið móttekur regluliga fráboðanir og frágreiðingar um smittusjúkur frá Rannsóknardeildini í Sjúkrahúsverkinum. Bráðfeingis fráboðanir fara beinleiðis til stjóran í Heilsustýrinum.
- Heilsustýrið er støðugt á varðhaldi og skal rópa varskó, tá ymsu partarnir av tilbúgvingini skulu gera seg til reiðar, tá ein farsótt kann taka seg upp.
- Kunna Heilsumálaráðið (landsstýrisfólk og aðalstjóra) regluliga um gongdina.

Kanningar
- Heilsustýrið hevur ábyrgd av, hvussu smittandi sjúkur skulu kannast. Rannsóknarstovan á Landssjúkrahúsinum letur smittutøl til Heilsustýrið regluliga og skjótt.
- Heilsusverkið hevur ábyrgd av, hvussu smittandi sjúkur skulu handfarast.
- Heilsustýrið hevur ábyrgd av koppsetingarætlanum – og hvørjum koppsett verður við.
- Heilsustýrið skal tryggja besta leist fyri skráseting av úrslitum o.ø. á einum felags palli fyri vitanardeiling.
- Heilsustýrið hevur ábyrgd av smittusporan.
- Heilsustýrið stendur fyri uppfylgjan av symptomum.

Ráðgeving og kunning

- Heilsustýrið kunnar Farsóttarnevndina og aðrar viðkomandi partar um støðuna.
- Heilsustýrið hevur ábyrgd av at veita faklig ráð og gera støðumetingar til OT
- Heilsustýrið skipar fyri, at bæði einstaklingar, arbeiðspláss, skúlar og stovnar fáa neyðugu kunningina.
- Heilsustýrið hevur ábyrgd av, at smittandi sjúkur ikki breiða seg á dagstovnum og skúlum,
- Heilsustýrið skal kunna almenningin gjøgnum miðlarnar.
- Heilsustýrið stendur, í samráð við Heilsumálaráðið, fyri miðling, samskifti, tíðindafundum osfr.
- Heilsustýrið svarar fyrispurningum, skrivliga og í telefonini, frá heilsustarvsfólki, stovnum og borgarum um smittusjúkur, undir hesum eisini sjúkur, sum ikki skulu fráboðast.
- Heilsustýrið veitir ráðgeving til kommunur, heilsutænastur, dag- og samdøgursstovnar, røktarheim og líknandi stovnar viðvíkjandi reinføri og smittufyribyrging.

Átøk

- Heilsustýrið skrivar sum myndugleiki út reglur um eitt nú at avmarka ella banna atgongd til viðgerðar- røktar- og umsorganarstovnar. Farsóttarnevndin eigur at vera við í tilgongdini.
- Heilsustýrið skipar fyri møguleikum fyri sóttarhaldi á gistingarhúsum ella øðrum uppihaldsmøguleikum (og matveitingum), til teirra, sum skulu avbyrgjast vegna smittuvanda. Heilsustýrið góðkennir sóttarhaldsstøð frammanundan. Heilsustýrið samskipar somuleiðis fyri flutningi til fólk, ið skulu í sóttarhald ella verða avbyrgd.
- Heilsustýrið vegleiðir um, hvussu mannagongdir kunnu vera við hús, tá ið eingi sóttarhaldspláss eru tøk.

Samskipan

- Apoteksverkið hevur ábyrgd av at fáa til vega koppingarevni og heilivág. Hetta arbeiðið verður samskipað við Heilsustýrið.
- Sjúkrahúsverkið tryggjar, at goymslurnar hava nóg mikið av brúksvørum til t.d. persónliga verju og onnur átøk innan reinføri, so sum sóttreinsing av lutum ella fólki. Hetta arbeiðið verður samskipað við Heilsustýrið.
- Sjúkrahúsverkið og Heilsufrøðiliga Starvsstovan tryggja, at neyðugi greiningarførleikin er í Sjúkrahúsverkinum og á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Í hesum føri ikki bara førleikin at gera greiningarnar, men eisini at gera nóg nógvar kanningar. Heilsustýrið verður javnan kunnað.

Farsóttarnevndin

Farsóttarnevndin hevur ásettar heimildir at seta ymsar fyriskipanir í verk í føroyska samfelagnum, og kann fáa hjálp frá løgreglu, tollvaldi og øðrum viðkomandi stovnum/myndugleikum, um tørvur er á tí. Heimildirnar eru ásettar í Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme, sum seinast broytt við bekendtgørelse nr. 180 frá 5. mars 2020, og fevna um eitt nú, at Farsóttarnevndin:

- kann krevja, at ein og hvør, sum verður mett/ur at vera smittað/ur, letur seg kanna hjá lækna og um neyðugt letur seg leggja inn á sjúkrahús til kanningar.
- kann krevja, at fólk verða avbyrgd og um neyðugt innløgd.
- kann krevja, at eitt øki verður avbyrgt.
- kann banna almennum tiltøkum í økjum, har alment vandamikil sjúka er.
- kann krevja líkskoðan, tá mett verður, at eitt andlát stavar frá alment vandamiklari sjúku.
- kann seta í verk bakteriufrøðiligar kanningar ella líknandi, sum eru neyðugar fyri við vissu at staðfesta smittuslag, uppruna og útbreiðslu.
- kann krevja, at fyritøkur lata aftur ella lata partvíst aftur ella banna smittaðum persónum atgongd til fyritøkur, tá vandi er fyri, at smitta kann breiða seg við framleiðslu og útbreiðslu av matvørum hjá fyritøkum.
- kann banna, at persónar, sum eru smittaðir við eini sjúku, ið er fevnd av hesi lógini, brúka almenn flutningstól.
- kann krevja, at persónar, sum mett verður kunnu vera dálkaðir við smittuevni ella lívfrøðiligum eiturevni, verða reinsaðir.
- kann krevja, at leysafæ, fastogn, flutningstól osfr. verða sóttreinsað.

- kann seta í verk aðrar fyriskipanir av avmarkaðum slagi og vavi fyri at forða fyri smittubreiðslu.
- hevur eftirlit við skipa- og flogferðslu
- Skal hava upplýsingar um heilsustøðu umborð á ferðini og við komu.
- Farsóttarnevndin gevur boð um loyvi til óavmarkaða samveru millum fólk av skipi ella loftfari og fólk í landi.
- kann krevja, at ein og hvør, sum kemur til Føroya, letur seg kanna av einum lækna og møguliga letur seg innleggja til kanningar.
- flýggjar út sóttarhaldsprógv til førarar um fyriskipanir, framferðarhátt og orsøkir.
- flýggjar út sóttarhaldsprógv til ferðandi, sendarar og móttakarar.
- veitir vegleiðing um atgongd til at royna málið í rættinum, tá áleggingar eru, sum eru at rokna sum frælsistøka.
- tekur ímóti fráboðanum um persónar, sum hava eina alment vandamikla sjúku.
- ásetir støddina á endurgjaldi í sambandi við tap, sum kemur sum ein avleiðing av fyribyrgjandi fyriskipanum. Um semja ikki fæst, skal nevndin leggja spurningin um endurgjald fyri dómstólarnar.

Sjúkrahúsverkið

Setir í verk tilbúgvingarætlan í Sjúkrahúsverkinum í sambandi við smittusjúkur/heimsfarsóttir.

Landssjúkrahúsið hevur eina medisinska tilbúgvingarætlan, sum lýsir arbeiðsgongdir, logistikk, virki, viðgerðarábyrgd o.s.fr., og fer hon í gongd, um tilbúgvingarætlanin verður sett í verk. Tilbúgvingarætlanin er skipað í tilbúgvingarstig, sum verða sett í verk, alt eftir hvat slag av hending talan er um, og hvussu umfatandi hon er.

Tilbúgvingarætlanin verður sett í gongd á Sjúkraflutningstænastan í Sjúkrahúsverkinum saman við vakthavandi medisinska lækna á Landssjúkrahúsinum. Alarmurin kemur aloftast frá alarmsentralinum 112, men kann eisini koma frá øðrum pørtum.

Landssjúkrahúsið er primera viðgerðarstaðið í sambandi við eina heimsfarsótt. Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús kunnu takast við, og tá verður tað gjørt í samráði við ábyrgdarhavandi medisinsku bakvaktina og leiðsluna í Sjúkrahúsverkinum.

Sjúkrahústænastan verður somuleiðis sett í verk gjøgnum Sjúkraflutningstænastaná Landssjúkrahúsinum.

Medisinska tilbúgvingin kann setast í gongd orsakað av nøgdini av smittutilburðum eins og av, hvussu álvarsom sjúkan er. Handfaringin kann vera ymisk, men yvirskipað er galdandi, at uttan mun til orsøkina má Landssjúkrahúsið vera til reiðar at taka sær av sjúklingunum, umframt at verja aðrar sjúklingar og starvsfólk. Tað merkir, at góð og neyv primer kunning er avgerandi fyri váðametingina.

Tilbúgvingarnevndin á Landssjúkrahúsinum endurskoðar medisinsku tilbúgvingarætlanina á Landssjúkrahúsinum fjórðahvørt ár ella eftir tørvi.

Apoteksverkið

Ger tilbúgvingarætlan fyri Apoteksverkið um neyðugan heilivág og koppingarevni. Samráðingar hava verið á ráðharrastigi um at tryggja Apoteksverkinum í Føroyum javnbjóðis atgongd til heilivág og koppingarevni, tá farsótt herjar. Hetta arbeiðið heldur fram, og formligar avtalur verða væntandi til skjals seinni í ár. Neyðugt er at hava eina rammuavtalu við danska Heilsumálaráðið um veitingar av koppingarevnum og heilivági, umframt veitingar av kritiskum heilivági og antidotum í krepputíð.

Kommunala tilbúgvingin (KHT)

Samsvarandi tilbúgvingarlógini hevur kommunustýrið ábyrgdina av tilbúgvingini í kommununi. Kommunur kunnu, heilt ella fyri ein part, vera felags um eina kommunala tilbúgving. Kommunan skal seta eina tilbúgvingarnevnd til fyrisiting av kommunalu tilbúgvingini. Kommunur, sum eru felags um kommunala tilbúgving, skulu samsvarandi hava eina felags tilbúgvingarnevnd.

Ábyrgdin av heilsutænastum til ellis- og røktarheim og heimatænastuna (heimasjúkrarøkt og heimahjálp) er løgd til kommununustýrini eins og ábyrgdin av dagstovnum, forskúlum og frítíðarskúlum. Stjórnarráðið, ið umsitur kommunumál, í løtuni Almanna- og mentamálaráðið, er yvirskipaður myndugleiki fyri kommunala

heilsuøkið, og stjórnarráðið, ið umsitur dagstovna- og skúlaøkið, í løtuni Barna- og útbúgvingarmálaráðið, er yvirskipaði myndugleikin fyri dagstovna- og skúlaøkið.

Ein fyritreyt fyri, at tilbúgvingin virkar væl, er gott samskifti og samstarv millum geirar. Hetta verður tryggjað við kommunalari umboðan í ráðum og nevndum. Kommunufelagið hevur umboð í Kreppuráðnum fyri Føroyar, í Farsóttarnevndini og í SLF.

Í sambandi við farsóttartilbúgvingina hevur Heilsustýrið undir Heilsumálaráðnum yvirskipaðu heilsufakligu ráðgevingina viðvíkjandi kommunala geiranum.

Henda fevnir um:

- at halda samband við kommunalu heilsutilbúgvingina (KHT) og aðrar heilsumyndugleikar fyri at fáa eitt samlað yvirlit yvir støðuna í landinum,
- at tryggja, at samsvar og samstarv er millum átøk, sum verða framd sentralt og desentralt,
- at ráðgeva kommunum um tilbúgvingarátøk og gera yvirskipaðar leiðreglur fyri handfaring av hendingum.
- allar kommunur skulu gera tilbúgvingarætlanir á heilsuøkinum, sum skulu endurskoðast í minsta lagi fjórðahvørt ár. Ætlanirnar skulu sendast Heilsustýrinum, sum veitir ráðgeving.

Heilsufakliga tilbúgvingin í kommununum verður skipað soleiðis:

Felags kommunalur farsóttarbólkur

Kommunurnar seta umvegis Kommunufelagið ein fastan farsóttarbólk, sum verður aktiveraður í sambandi við hóttan um eina heimsfarsótt. Kommunala farsóttartilbúgvingin verður skipað við limum umboðandi KHT. Fólk við førleikum innan smittuverju verða knýtt at bólkinum. Farsóttarbólkurin kann verða mannaður við umboðum fyri dagstovnaøkið og/ella skúlaøkið, tá ið felags átøk á hesum økinum verða umrødd. Kommunufelagið virkar sum umsiting og samskipar arbeiðið hjá Farsóttarbólkinum, og kann við stuttum skotbrái aktivera politisku leiðslurnar í kommununum.

Millumkommunalir farsóttarbólkar

Tær átta KHT-eindirnar skipa hvør sína felags farsóttartilbúgving. Leiðslan hevur ábyrgd av at skipa hesa í samráð við Heilsustýrið. Stýrið fyri KHT er tilbúgvingarnevnd.

Kommunalir farsóttarbólkar

Hvørt kommunustýri sær skal skipa eina farsóttartilbúgving ella ganga í samstarv við annað kommunustýri um at skipa eina farsóttarætlan.

Heilsutrygd

Heilsutrygd skipar og varðar av Kommunulæknaskipanini, Gigni og Økisheilsuskipanini og tryggjar, at starvsfólkini í hesum skipanunum kunnu luttaka í arbeiðinum, tá tilbúgvingarætlanin fyri farsóttir verður sett í verk.

Allar hesar skipanirnar røkja týdningarmiklar uppgávur, og hóast tilbúgvingarætlanin verður sett í verk, skulu dagligu kjarnuuppgávurnar røkjast so væl sum gjørligt.

Í hesum sambandi verður m.a. arbeitt við at betra um møguleikarnar við fjarskiftisviðtalum, soleiðis at tær kunnu gerast tryggar og harvið eisini minka um smittuvanda o.a.

Tá tilbúgvingarætlanin verður sett í verk, luttaka starvsfólkini í Kommunulæknaskipanini, Gigni og Økisheilsuskipanini í arbeiðinum í tann mun, tað er neyðugt, samstundis sum dagligu kjarnuuppgávurnar verða røktar sum best.

Kommunulæknaskipanin

Kommunulæknaskipanin er mannað við kommunulæknum í føstum starvi umframt kommunulæknaavloysarum, har eingin lækni er í føstum starvi. Ofta eru avloysararnir útlendskir. Undir eini heimsfarsótt kann vera trupult at fáa útlendskar avloysarar til Føroya, og tí verður skipanin verri mannað enn vanligt.

Kommunulæknaskipanin er tó ein týðandi partur av ymiskum átøkum í eini farsótt. Kommunulæknar eru oftast fyrst í røðini at handfara diagnostikk, fráboðan og møguliga koppsetingar.

Gigni

Hjá Gigni starvast uml. 30 heilsufrøðingar, sum eru sjúkrarøktarfrøðingar, ið hava framhaldsútbúgving sum heilsufrøðingar.

Heilsufrøðingarnir veita børnum undir skúlaaldur og familjum teirra fyribyrgjandi og heilsufremjandi heilsukanningar. Hetta verður gjørt við heimavitjan, har heilsufrøðingarnir eisini vegleiða um heilsu, menning og trivnað hjá barninum.

Henda sama tænasta verður boðin børnum í skúlaaldri. Tá verður tilboðið veitt úti í skúlunum kring landið. Heilsufrøðingurin eygleiðir eisini heilsuviðurskiftini hjá einstaka barninum.

Gigni bjóðar eisini vegleiðing um heilsu, menning og trivnað, har tørvur er á tí. Tað kann vera, um persónur hevur tørv á øktari vegleiðing orsakað av ymiskum avbjóðingum, og til lærarar, dagrøktarar, starvsfólk í barnagørðum og líknandi.

Um farsótt herjar, og tilbúgvingarætlanin verður sett í verk, skulu heilsufrøðingarnir røkja dagligu kjarnuuppgávurnar so væl sum gjørligt. Fyri at minka um smittuvandan verða øll neyðug stig tikin, og arbeitt verður eisini við loysnum innan fjarskiftisviðtalur.

Um neyðugt eru heilsufrøðingarnir eisini tøkir í sjálvari tilbúgvingini.

Økisheilsuskipanin

Í Økisheilsuskipanini starvast fýra kliniskir dietistar við løggilding frá danska Sundhedsstyrelsen. Dietistarnir hava viðtalur kring landið. Flestu viðtaluhølini eru í kommunulæknaviðtaluhølunum. Tá kommunulæknin metir tað vera neyðugt, kann hann ávísa fólk, sum lúka ávísar treytir, til viðtalu hjá dietisti.

Um farsótt herjar, og tilbúgvingarætlanin verður sett í verk, skulu dietistarnir røkja dagligu uppgávurnar so væl sum gjørligt. Fyri at minka um smittuvandan verður miðað ímóti at gera so nógv sum gjørligt við fjarskiftisviðtalum.

Um neyðugt eru dietistarnir eisini tøkir í sjálvari tilbúgvingarætlanini.

Landsdjóralæknin/Heilsufrøðiliga Starvsstovan

Ger tilbúgvingarætlanir og stendur fyri niðurberjing av djórasjúkum, íroknað zoonosum. Stendur fyri greining av sýnum frá fólki og fyri mikroverur, um Sjúkrahúsverkið ikki megnar uppgávuna í stórfarsóttartíðum. Neyðugt er at hava tvær almennar rannsóknarstovur, sum kunnu gera hóp-PCR-kanningar, og tær eiga at vera á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og á Landssjúkrahúsinum. Í sambandi við koronufarsóttina í 2020 gjørdi Sjúkrahúsverkið saman við HFS eitt tilmæli til Heilsumálaráðið um neyðugu íløgurnar í eina rannsóknarstovu á Landssjúkrahúsinum, sum hevur neyðugu arbeiðsorkuna til stórfarsóttir. Stovnarnir standa framvegis saman um hetta tilmælið.

Almannaverkið

Endamálið við Almannaverkinum er at tryggja at borgarar fáa neyðuga hjálp og stuðul til at liva eitt gott og sjálvstøðugt lív, og veitir m.a. hesar tænastur:

- Stuðulstænastur
- Bútilboð til fólk í vardum bústaði
- Bútilboð til fólk í fyribils bústaði
- Umlætting til børn og vaksin
- Virknistænastur til børn og vaksin
- Endur- og viðlíkahaldsvenjing
- Sosialnámsfrøðiliga viðgerð á barnaverndarstovnum

Almannaverkið virkar um allar Føroyar.

Almannaverkið fevnir breitt, bæði í mun til tænastur og landafrøðiliga. Stovnurin arbeiðir tí við at gera eina tilbúgvingarætlan, sum tekur atlit til hetta, ið kann setast í verk um farsótt tekur seg upp.

Keldur

1. *Bekendtgørelse for Færøerne om lægers anmeldelse af smitsomme sygdomme nr. 596 af 10 juni 2014*, sum seinast broytt við kunngerð nr. 74 frá 20 juni 2024
2. *Anordning nr. 655 af 14 juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme*, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 mai 2024.
3. *Sundhedsloven*
4. *Hvussu stýrdi Føroyar gjørgnum COVID-19 frá 20 juni 2024*
5. *Svalbard Preparednessplan 2024*
6. *PRET. WHO preparedness and resilience for emerging threats. May 2024.*
7. *Koppingarætlan fyri Føroyar 2020*
8. *Tilbúgving fyri Føroyar.* Fiskimálaráðið 2017.
9. *Aftale om samarbejde mellem færøske og danske myndigheder efter Færøernes overtagelse af epidemiområdetaf november 2023.*
10. *Føroysk tilbúgvingarætlan ímóti heimsfarsótt við beinkrími. Landslæknin 2006.*
11. *Planlægning af sundhedsberedsskab. Sunhedsstyrelsen 2023.*
12. *Ikrafttrædelse af lov om ioniserende stråling og strålebeskyttelse for Færøerne. Anordning nr. 1035 af juni 2022.*
13. *Tilmæli til Landsstýriskvinnuna um broytingar í parti B og ávísar ásetingar í parti A í løgtingslóg um Apoteksverkið og heilivág.*
14. *Nationalt risikobillede. Beredsskabsstyrelsen 2022*
15. *Vejledning om anmeldelse af smitsomme sygdomme. Sundhedsstyrelsen 2023.*
16. *Kreppustýring í Føroyum. Fiskimálaráðið 2020*

Fylgiskjøl

1. Tilbúgving fyri Landssjúkrahúsið
2. Tilbúgving í Heilsustýrinum (Flowsheet og diagramm)
3. Kommunala tilbúgvingin

SANSIR